

Jødadómur

Søgan hjá jødadóminum gongur langt aftur í tíðina. Jødar trúgva á *ein* Gud, ið gjørdi sáttmála við ættfaðir teirra, Ábraham. Jødar nevna hann eisini "faðir okkara Ábraham".

Ábraham livdi um ár 2000 f.Kr. í býnum Ur í gamla Mesopotámia, nú Irak. Ábraham var rættvísur og gudrøkin maður, og Gud helt hann vera tann rætta at heita á til sínar ætlanir. Gud bað Ábraham savna ætt sína og fara til eitt land, sum hann vildi vísa teimum á. Afturfyri skuldu Ábraham og allir eftirkomarar hansara lova at trúgva á Gud og gera alt tað, hann beyð teimum. Gud lovaði, at hann til allar tíðir vildi verja Ábraham og allar eftirkomarar hansara. Soleiðis gjørdi Gud ein sáttmála ella eina avtalu við tey, at tey vóru hansara fólk, og at hann vildi vera Gud teirra.

Umleið 500 ár seinni endurtók Gud hendan sáttmálan, tá ið hann gav Mósesi tey 10 boðini. Av hesum nevndu jødar hann "lærari okkara Móses". Í boðunum varð greitt staðfest, hvussu tey skuldu bera seg at móti Gudi og ímóti hvørjum øðrum.

FAKTA

Ábraham og øll hansara livdu sum nomadar ella flakkarar. Tey ferðaðust úr einum staði í annað við øllum, tey áttu, og tey búðu í tjøldum. Søgan hjá jødum hevur eisini mangan verið merkt av, at tey hava verið noydd at flyta og at stríðast fyri sínum rættindum.

? ættfaðir · rættindum

Ferðin til tað lovaða landið var drúgv, men umsíðir komu tey til Kánáanland. Ímeðan teir tríggir kongarnir, Sául, Dávid og Sálomon, ráddu í landinum, var stórur framburður. Men tá ið Sálomon doyði, fór landið í tvíningar. Navnið á norðara partinum gjørdist Ísrael, og sunnara parturin varð nevndur Júda ella Judæa. Orðið jødi kemur av orðinum Júda.

Nógvir jødar vónaðu, at teir aftur fóru at fáa ein kong av Dávids ætt. Hesin Messias, tann salvaði kongurin, skuldi gera landið sterkt og frælst. Hann var friðarhøvdingurin, ið skuldi gera alt gott. Enn í dag bíða nógvir jødar eftir, at tann lovaði Messias skal koma.

Jødisku skriftirnar

Tanak er heilaga bókin hjá jødum. Biblian og Tanak eru líkar á tann hátt, at tað, sum kristin kenna sum Gamla Testamenti, eisini er í Tanak. Tanak er skrivað á hebraiskum máli. Har eru allar frásagnirnar heilt frá skapanini til umleið 300 ár fyri okkara tíðarrokning, tá Nýggja Testamenti tekur við. Men ikki minst viðger skriftin sambandið millum Gud og menniskju.

Tanak er í býtt í tríggjar partar. Fyrsti parturin er Torain, ella tær fimm Mósebøkurnar. Hesin partur verður hildin at vera tann týdningarmesti, tí har stendur tann elsta søgan hjá jødum, og har eru lógirnar hjá jødadóminum eisini at finna. Til samans eru 613 ymiskar lógir og reglur. Ofta er teksturin skrivaður á rullur úr pergamenti, og lisið verður frá høgru til vinstru.

Boð úr Toraini

"Lat ikki hjarta títt hýsa hatri móti bróður tínum...
tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg. Eg eri Harrin!"
3. Mós 19,17 -18

Annar partur eru profetabøkurnar. Tríggir av teimum kendastu profetunum vóru Ezekiel, Jesaja og Jeramia, men fleiri aðrir profetar vóru eisini. Elias er ein teirra, men eingin bók ber navn hansara. Profetarnir komu við boðum frá Gudi og talaðu at, um fólkið ikki livdi, sum Gudi hóvaði.

FAKTA

Tanak ella TaNaCH er ein stytting av Torah-Neviim-Ketubim, sum merkir Lógin, Profetarnir og Skriftirnar.

Í Toraini eru 613 forskriftir, 248 boð (tú skalt...) og 365 forboð (tú mást ikki...). Talið 248 svarar til talið av beinum, vit hava í kroppinum, og 365 svarar til dagatalið í árinum. Jødisk siðvenja er, at menniskja alt árið skal liva eftir Toraini.

Tora-rullurnar verða sera væl viðfarnar. Tær eru í vøkrum hylki úr silki ella floyali. Onkuntíð eru hesi hylki úr træi og klødd við silki. Tora rullurnar eru eisini prýddar við metalkrónum og klokkum.

? framburður · tvíningar · hebraiskum · pergamenti

Visti tú

at í Ísrael er hebraiskt høvuðsmálið hjá jødum. Í skúlanum læra børnini eisini arabiskt og enskt.

FAKTA

Tá lisið verður í Toraini, verður nýttur ein peikipinnur, so ikki verður nortið við rullurnar. Ofta er hesin úr silvuri.

Triði parturin eru Skriftirnar. Har eru ymiskir tekstir, og fleiri teirra viðgera søgu jødanna. Ein partur, ið verður nógv nýttur, er Sálmarnir. Sálmarnir eru 150 í tali, og hóast teir ofta verða nevndir Dávids sálmar, hevur Dávid kongur helst ikki yrkt teir allar. Har eru ymisk sløg av sálmum, t.d. takkarsálmar, bønarsálmar, lovsálmar og signingar. Enn í dag nýta jødar hesa sálmabók. Nógvir sálmar og sangir eru yrktir burtur úr Dávids sálmum.

Jødar hava eisini aðrar heilagar skriftir. Ein av teimum er Talmud, ið kann samanlíknast við eina alfrøði um Tanak. Hesar skriftir verða nógv nýttar, tá ið roynt verður at granska og gera seg kunnugan við jødisku bibliuna.

Jødiskar trúargreinar

Tað eru ymiskar trúargreinar innan jødisku trúnna. Tey, ið leggja stóran dent á at liva eftir tí, ið stendur í Toranini, kallast ortodoksir jødar. Tey ganga ílatin, gera mat og halda alt, sum skriftin áleggur teimum. Tey, ið ikki leggja so stóran dent á tað, ið skrivað stendur og eru meira broytingarsinnað, kallast reformertir jødar. Tað eru eisini aðrar greinar av jødadóminum. Allir jødar eru tó samdir um, at tey 10 boðini enn eru galdandi. Men av øllum lógum og reglum er tað tó ein, ið skarar framúr: *Tú skalt elska næsta tín, sum sjálvan teg.* Hetta boð er heldur ikki ókent í øðrum átrúnaðum.

Ortodoksir jødar.

Ungir jødar.

? signingar · broytingarsinnað · skarar framúr

Jødar biðja við Grátimúrin í Jerúsalem í Ísrael.

Jerúsalem

Jerúsalem er heilagi býurin hjá jødum. Templið í Jerúsalem var staðið, har jødar hildu seg kunna tilbiðja Gud av heilum huga.

Tað fyrsta templið læt Sálomon kongur byggja í árinum 960 f.Kr. Í árinum 586 f.Kr. løgdu bábylonar templið í oyði, og fólkið varð tikið til fanga og fört til Bábylon sum trælir. Í 70 ár vóru tey í útlegd. Men tá ið tey komu aftur til Jerúsalem, bygdu tey templið upp av nýggjum.

Í seinastu øldini f.Kr. gjørdist landið partur av Rómverjaríkinum. Um ár 70 e.Kr. gjørdu jødar uppreistur ímóti rómverska harradøminum. Uppreisturin varð bardur niður. Rómverjar fóru inn í templið og løgdu tað í oyði. Eldur varð settur á, og tempulprýðið varð flutt til Róm. Hesin dagur er jødum minniligur, og ortodoksir jødar biðja hvønn dag um, at templið verður bygt uppaftur.

Einasti partur av templinum, ið eftir stendur, er Vesturmúrurin, eisini nevndur Grátimúrurin, sum er toftirnar av templinum, ið varð lagt í oyði í árinum 70. Jødar koma hagar at biðja. Teir stinga smáar bønarlepar inn í rivurnar ímillum steinarnar í múrinum, samstundis sum teir syrgja, tí einki tempul er til longur.

Har templið einaferð stóð, stendur í dag ein moska. Moskan á tempulplássinum er heilag hjá muslimum. Teir trúgva, at tað var har, Ábraham ætlaði at ofra son sín Ísak.

Jerúsalem hevur eisini stóran týdning hjá kristnum, av tí at stórur partur av Jesu lívi er knýttur at Jerúsalem.

Klettamoskan í Jerúsalem. Moskan stendur har templið hjá jødum einaferð stóð.

? harradøminum · toftirnar · bønarlepar

Seder, máltíð, sum verður hildin fyrsta kvøldið í sambandi við jødisku páskirnar.

Heimið

Heimið hevur stóran týdning, tá talan er um at liva sum jødi. Tað er í heiminum, at allar siðvenjurnar verða førdar víðari til børnini og tey ungu. Frá trý ára aldri taka børnini lut í øllum átrúnaðarligum siðum. Har verða tær gomlu frásagnirnar fortaldar, har verður sungið og biðið. Har verða máltíðir, veitslur og høgtíðir fyriskipaðar. Meginparturin er grundfestur í søgu jødanna og hevur síni eyðkenni haðani. Men í jødisku familjuni verða tey eisini lærd at æra foreldrini og eldri fólk, at hjálpa teimum, ið treingja, at vera gestablíð, at vitja sjúk og ikki at slatra og tosa ilt um onnur.

Mezuzain

Við høvuðsdyrnar í einum jødiskum heimið er ofta heft eitt lítið hylki. Tað er eitt verndarhylki, mezuzain, og í tí er ein lítil pappírsrulla við orðum úr Toraini, Shema: *Hoyr, Ísrael, Harrin, Guð vár, Harrin er einastur!* Hesi orð eru sera týdningarmikil og eru partur av bæði morgun- og kvøldbønini. Tá farið verður inn gjøgnum dyrnar, verður nomið við verndarhylkið við fingrasnippunum, og síðani verða fingrarnir mussaðir. Við hesum vísa tey, at tey ikki ivast í, at Gud er til.

FAKTA

Við høvuðsdyrnar í einum jødiskum heimi er ofta heft eitt lítið hylki. Tað er eitt verndarhylki, mezuzain. Í hylkinum eru orð úr Toraini – Shema. Tey nema við hylkið og mussa fingrasnipparnar fyri at vísa, at tey eru Gudi lýðin.

Jødisk orðatøk

Ein býttlingur sigur tað, hann veit,
ein klókur maður veit, hvat hann sigur.

Gud gav menniskjum ein munn og
tvey oyru, fyri at tey skulu lurta dupult
so nógv, sum tey tosa.

Døm ongantíð menniskju,
áðrenn tú hevur staðið í teirra stað.

? siðvenjurnar · grundfestur · treingja · hylki



Sýnagoga í Sofia í Bulgaria.

Sýnagogur

Sýnagogan hevur eisini sera stóran týdning fyri trúarlívið hjá jødum. Sýnagogur eru í dag at finna í mongum londum, har jødar hava sett búgv. Sjálvur byggihátturin er ofta merktur av staðnum ella tíðini, men sjálvur bygningurin og innrættingin minnir um templið í Jerúsalem. Flestu sýnagogur hava eina dávidsstjørnu á vegginum uttanfyri, og ofta eru hebraisk skrifttekn oman fyri høvuðsdyrnar.

Innast í sýnagoguni er eitt serstakt skáp ella lítið rúm, ið verður kallað "Tann Heilaga Ørkin". Ørkin er sum oftast á einum veggi, ið vendir ímóti Jerúsalem. Skriftrullurnar verða goymdar í ørkini. Har lýsir altíð ein lampa, "tað æviga ljósið", til minnis um templið í Jerúsalem.

Í øllum sýnagogum hanga tvær talvur við teimum 10 boðunum skrivaðum á hebraiskum máli. Sum oftast hanga talvurnar oman fyri Ørkina. Ein rabbini stendur fyri gudstænastuni. Umframt tað skal hann ráðgeva og vegleiða, um limir hava brúk fyri tí. Ofta er eisini ein

FAKTA

Myndaforboð:
ongar myndir og høggmyndir eru at finna í sýnagogunum.

Dávidsstjørnan er eyðkenni fyri jødadómin. Dávid, ið var kongur í 900-talinum f.Kr., varð hildin at vera mætasti kongur jødanna.

? skrifttekn · rabbini

FAKTA

Í øllum sýnagogum er ein ljósastaki, menora. Har eru átta ljós, men ofta er pláss til eitt níggjunda ljós, ið skal nýtast at tendra hini við. Tey átta ljósini skulu ímynda tær átta næturnar í templinum. Eitt ljós verður tendrað fyrsta dagin, tvey tann næsta o.s.fr. Serstøk bøn verður biðin og vælsignilsi lisið við hvørt ljós, ið tendrað verður.

FAKTA

Sabbat merkir hvíld.

Visti tú

at í mongum jødiskum heimum koyra tey pening í eina bússu í sambandi við sabbatina og aðrar høgtíðsdagar. Hesin peningur fer til vælgerandi endamál.

kantorur í sýnagoguni. Tað er ein sanglærdur maður, ið leiðir felagssangin undir gudstænastuni og eisini syngur partar av Toraini.

Fast á skránni til gudstænasturnar er lestur úr Toraini, eitt ávíst stykki úr Móselógini.

Umframt at lisið verður úr Toraini, verða eisini partar av profetabókunum lisnir. Aðrar skriftir verða lisnar við serlig høvi. Og Dávids sálmar verða sungnir við hvørja gudstænastu.

Í summum sýnagogum sita menn og kvinnur hvør sær. Ofta sita kvinnurnar og smæstu børnini uppi á svalum ella fyri seg aftast í salinum.

Sabbat

Sabbatin er jødiskur hvíludagur, sum byrjar við sólsetur fríggjadag og endar við sólsetur leygardag. Allir hátíðardagar hjá jødum eru frá sólsetri til sólseturs. Víst verður til 1. Mós 1,5, har tað stendur: *og Guð kallaði ljósið dag, og myrkri nátt. Og tað varð kvøld, og tað varð morgun – fyrsti dagur.* Fríggjadag verður sabbatin fyrireikað. Tað verður ruddað og vaskað, og sabbatsmáltíð verður gjørd. Tey lata seg í vøkur klæðir og leggja gerandisdagin við stríði og strevi afturum. Ofta bjóða tey gestum til vakurt dekkað borð, til sang, bøn og lestur.

Í heimunum byrjar sabbatin við, at mamman tendrar í minsta lagi tvey ljós og biður eina bøn, ið heilsar sabbatini vælkomnari. Ljósini ímynda gleði og heilagleika. Summi húski tendra harafturat eitt ljós fyri hvørt barn, tey eiga.

? svalum · sólsetur

Jødiskar kvinnur og jødiskir menn eru javnsett, tá talan er um arbeiði, inntøku, húsligt arbeiði: reingerð, matgerð og barnaansing. Men í trúarligum ritualum hava kvinnur og menn ymiskar leiklutir. Mamman t.d. tendrar ljósini, meðan pápin vælsignar tey bæði flættaðu breyðini. Breyðini ímynda ta dupultu nøgdina av manna, ið Gud hevði boðið fólkinum at savna fríggjadagar, meðan tey vóru í oyðimørkini á veg til tað lovaða landið.

FAKTA

Eingin veit við vissu, hvat manna er. Tað kann hava verið storknað, sukurmikil sevja, sum stavar frá eini lús, sum sýgur oyðimarkarplantuna Ta-marix mannijera.

Høgtíðir

Tá ið templið stóð, fóru jødar tríggjar ferðir um árið niðan til Jerúsalem. Tey høvdu offurgávur við til templið og prestarnar. Tað var til høgtíðina pesach, páskahátíðina, ið varð hildin 7 dagar um várið, og har tey eisini offraðu eitt lamb framman fyri templið. Onnur høgtíðin var shavout, hvítusunnan, ið varð hildin sjey vikur eftir páskahátíðina, sum tøkk fyri Toraina, og sum tøkk fyri ársins fyrstu grøði. Tann triðja stóra høgtíðin var sukkot, leyvsalshøgtíðin, sum var ein heystveitsla, ið varð hildin 7 dagar um heystið til minnis um ferðina gjøgnum oyðimørkina og sum tákkarhøgtíð fyri tað, ið heystað var.

FAKTA

Pesach merkir at ganga framvið. Í *2. Mós 12* lesa vit um deyðseingilin, ið gekk fram við durunum hjá jødum ta náttina, tey riggaðu til at fara úr Egyptalandi.

Enn í dag halda jødar fleiri høgtíðir og minnisdagar.

Pesach

Jødisku páskirnar eru ein stór høgtíð, sum verður hildin um várið. Hendan høgtíðin verður hildin til minnis um, at tað eydnaðist Gudi við tænara sínum Mósesi at leiða fólkið úr trældóminum í Egyptalandi til tað lovaða landið, Kánaanland. Undir gudstænastuni verður lisið tað brotið úr Toraini, ið fortelur, hvussu hetta fór fram. Maturin, ið verður gjørdur til páskamáltíðina, ímyndar ymiskt frá tíðini í trældóminum í Egyptalandi.

Shavout

Jødiska hvítusunnan verður enn hildin til minnis um lóggávuna á Sinai fjalli og sum tøkk fyri grøðina. Sýnagogurnar verða prýddar við blómum á sama hátt, sum Gud prýddi Sinai fjallið, tá hann gav teimum Toraina. Hesa høgtíð eta tey ofta mat við mjólkarúrdrátti í t.d. ostakaku.

? ritualum · offurgávur · grøði · lóggávuna · mjólkarúrdrátti

Visti tú

at tá ið Purim verður hátíðarhildið í sýnagoguni, lata børnini seg í eins og føroysk børn á føstulávint. Søgan um Ester verður lisin upp, og hvørja ferð navnið á Háman verður nevnt, halda tey nógvan gang fyri at køva navnið á honum.

Purim

Um summarið hátíðarhalda tey Purim. Henda høgtíð verður hildin til minnis um Ester drotning. Hon var gift við persiska konginum Áhasverus, ið var óvitandi um, at Ester var jødi. Kongur hevði ein ráðgeva, ið æt Háman. Boð vóru givin um, at øll skuldu falla á knæ fyri Hámani. Men tað vildi Mordokai ikki. Hann var fosturpápi Ester, og sum jødi vildi hann bara falla á knæ fyri Gudi. Tá Háman sá hetta, gjørdist hann í øðini og fekk kongin at senda boð út um landið, at allir jødar skuldu verða tiknir av døgum.

Men tað eydnaðist Ester at yvirtala Áhasverus kong at broyta hesa ætlan. Háman varð sjálvur hongdur í gálgan, hann hevði ætlað Mordokai.

Sukkot

Hendan høgtíð verður eisini kallað leyvsalshøgtíðin. Ofta byggja tey sær smáttur av leyvi, sum tey so eta í ella halda til í meginpartin av teimum sjey døgunum, høgtíðin varir. Hetta skal minna tey á, hvussu jødar búðu á heimferðini úr Egyptalandi, men eisini á tær smáttur, ið bøndur bygdu um heystið, fyri at vera so nær markini sum gjørligt. Nógv heingja nakað av tí, ið heystað er, upp undir loftið í leyvsmáttuni, t.d. hveiti, bygg, vínber, olivin, granatsúrepli, dadlur og fikur.

Chanukah

Í desember mánaði verður hildin ljósveitsla, ið kallast Chanukah. Tað kemur av orðinum at víga, og veitslan verður hildin til minnis um endurvígsluna av templinum. Henda høgtíðin varir í átta dagar. Tá verður tann áttaarmaði ljósastakin tendraður til minnis um eina hending í Jerúsalem í árinum 165 f.Kr. Jødiska fólkið hevði gjørt uppreistur ímóti grikkum, ið høvdu hersett landið og vanhalgað templið. Ein bólkur av jødum var innistongdur í templinum. Har var bara ein ljósastaki í templinum, og olju høvdu tey bara til ein dag. Men hóast hetta brann oljan í átta dagar.

? fosturpápi · gálgan · endurvígsluna · vanhalgað

Trúarjáttan

Tað týdningarmesta í jødisku trúnni er, at tað bert er *ein* Gud. Hann er ævigur, ósjónligur, hevur skapað allan heimin og øll menniskju. Hann ræður yvir øllum, men hann er eisini hjá menniskjum og lurtar eftir teimum. Trúarjáttanin verður eisini nevnd Shemabønin.

Visti tú

at Shemabønin er at finna í *5. Mós 6,4-9*

Bøn

Frá trý ára aldri verður væntað, at jødar hava Gud við í øllum tí, teir gera, og at teir biðja stuttar bønir, sum eru til øll høvi. Biðjast kann innantanna, hart ella kann verða sungið. Vanliga verður biðið standandi ella sitandi. Tó skal kvøldbønin biðjast í songini. Áðrenn máltíðina fríggjakvøldið, sabbatsmáltíðina, og við allar høgtíðir vælsigna foreldrini børnini og biðja Gud um at hjálpa teimum og vakja yvir teimum. Genturnar verða vælsignaðar við teimum góðu eginleikunum hjá teimum "fýra mammunum" hjá jødiska fólkinum: Sáru, Rebekku, Rakul og Leu. Dreingirnir verða vælsignaðir við vælsignilsinum, ið Jákup gav abbasynum sínum, Efraim og Manassa. Hesir vóru synir Jósefs.

FAKTA

Kosher:
er jødiska orðið fyri nakað, ið er loyvt. Verður mest nýtt um, hvat loyvt er at eta og drekka.

Hvat er kosher?
Reglurnar fyri kosher standa í Toraini

- øll frukt og grønmeti
- alt, sum veksur á runnum, trøum og í moldini
- fiskur við fjaðrúm og roðslu, t.d. toskur, laksur og sild
- djór, sum eta gras og annað grønt, jótra og hava kleyvar, t.d. neyt og seyður
- nakrir fuglar, t.d. høsn, dunnur, gæs og kalkunir

Alt skal verða slaktað eftir ávísari siðvenju fyri at vera kosher.
Í *3. Mós 11* er ein langur listi yvir tey djór, ið etast kunnu.

Tefillin

Menn í teimum ortodoksu sýnagogunum bera eisini tvær smáar leðureskjur. Í teimum eru smáar rullur av pergamenti, har tvey tey fyrstu brotini av Shemabønini eru skrivað á. Eskjurnar hava langar reimar. Onnur eskjan verður bundin ovarlaga um vinstra arm, tó um høgra um ein er vinstrahentur, og hon skal venda inn ímóti hjartanum. Hetta skal minna á týdningin av at elska Gud. Hin eskjan skal vera mitt á pannuni beint oman fyri hárgarðin. Hetta skal minna á eisini at elska og tæna Gudi við góðum huga.

Matur

Mong jødisk húski nýta eina matarvegleiðing kallað Kosher, fyri at vissa seg um, at allur matur, ið etin verður heima ella úti, er lógligur. Eftir lógini má mjólk og mjólkarúrdráttur ikki verða tilgjørdur ella etin saman við kjøti. Og tí hava tey eisini køksbúnýti, ið bert verða nýtt til ávísan mat. Hetta kann eisini verða galdandi fyri vøsk og uppvaski-maskinur. Eisini verður gingið høgt upp í at vaska sær um hendurnar á rættan hátt, áðrenn farið verður til borðs.

Visti tú

at tað eru serliga útlærdir jødiskir slaktarar, ið slakta júst eftir forskriftunum í skriftini.

? trúarjáttan · innantanna · hárgarðin · køksbúnýti · roðslu · jótra

Ungur drongur lesur úr Toraini í sambandi við Bar Mitzva.

Lívsháttíðir

FAKTA

Umskering er ein lítil skurður, ið verður gjørdur av einum lækna ella av øðrum, ið er lærdur á økinum. Forhúðin á kynsliminum verður skorin burtur. Drongurin fær ikki so ilt, tí kenslunervarnar eru ikki fult mentar hjá so lítlum børnum. Og átta dagar seinni er sárið lekt.

Føðing

Er eitt dreingjabarn føtt, skal hann umskerast áttanda dagin. Hetta er fyri at staðfesta, at hann nú eru undir sama sáttmála sum Ábraham, ættfaðir teirra, ið eisini læt Ísak, son sín, umskera áttanda dagin.

Er barnið ein genta, verður hon borin fram í sýnagoguni fyrsta sabbatsdag eftir føðingina. Pápi gentuna verður biðin at koma upp, har skápið við Torarullunum stendur, at siga, hvussu gentan skal eita.

Summir jødar geva børnum sínum tvey nøvn, eitt hebraiskt og eitt, ið er meira vanligt í landinum. Aðrir jødar geva barninum bert eitt hebraiskt navn.

Skiftið til vaksnamannalívið

Gentur verða hildnar at vera vaksnar, tá ið tær eru 12 ára gamlar, og dreingir, tá teir eru 13 ára gamlir. Tey skulu nú halda boðini í Toraini. Vanligt hevur verið, at tey fáa frálæru í Toraini fyri at gerast "Bar Mitzva", ið merkir sonur at boðunum, og hjá gentum "Bat Mitzva", ið merkir dóttir at boðunum. Við eitt hátíðarhald í sýnagoguni skulu tey lesa úr Toraini – á hebraiskum máli og svara spurningum frá rabbinaranum. Síðani verður stór veitsla hildin. Dreingirnir kunnu nú luttaka í gudstænastunum á jøvnum føti við menninar og verða taldir upp í teir 10, ið er talið, ið krevst fyri at halda gudstænastu.

Kalottar. Jødiskir menn hava ofta kalott á høvdinum.

Í nøkrum sýnagogum verður hildið fast við, at tað bert eru dreingirnir, ið sleppa at lesa í Toraini. Genturnar kunnu savnast í smærri bólkum og kanska lesa yrkingar ella syngja sálmar, men sum so verður einki serstakt gjørt í sambandi við gudstænastuna fyri teimum. Foreldrini kunnu tó halda veitslu fyri gentunum.

Jødi er ein, ið er føddur av jødiskari *mammu*. Tað ber tó til at gerast jødi við at skifta ella konvertera, sum tað eisini verður nevnt, til jødisku trúnna. Tá skalt tú ganga til undirvísing í sýnagoguni og fylgja lógum og reglum í jødisku trúnni í longri tíð. Eftir hetta ber til at gerast limur í einari jødiskari samkomu.

Hjúnalag

Tað er ymiskt, hvussu brúdleypssiðirnir eru. Fyrst og fremst er hjúnalagið ein avtala ímillum eina kvinnu og ein mann, og tvey vitni skulu vera til staðar.

Sjálv vígslan er undir einari baldakin, einum hásætishimmali, ið skal ímynda framtíðar heim teirra. Vanliga verður parið vígt í sýnagoguni, men vígslan kann eisini verða uttandura. Rabbinarin skipar fyri vígsluni. Brúðurin rættir fram høgra fremstafingur, og brúðgómurin setur ring á hann og sigur: *Við hesum ringi ert tú sambært Mósesi og Ísraels lóg vígd mær.*

FAKTA

Í sýnagoguni hava menninir og dreingirnir ein "kipak", ein kalot, á høvdinum og ein "tallit", eitt biðisjal, um herðarnar til at hávirða Gud.

Baldakin, hásætishimmal.

Brúðgómurin setur ring á fremstafingur á brúðrini.

Brúðgómurin rættir brúðrini eina skrivliga avtalu, ketuba, har hann lovar, at hann altíð vil syrgja fyri henni, vil vera trúgvur og æra og elska hana. Brúðurin hevur slør fyri andlitið, men tá avtalan er undirskrivað, verður sløríð lyft.

Brúðarparið drekkur eitt og sama glas av víni, sum rabbinarin hevur vælsignað. Hetta skal vera eitt tekin um, at tey nú eru eitt og skulu fylgjast í gleði og sorg. Síðani verður vælsignilsi sungið yvir parið. Hátíðarhaldið endar við, at brúðgómurin traðkar á eitt glas, so tað brotnar. Glasið er innpakkað, so eingin fær skaða av hesum. Hetta er ein gomul siðvenja, ið skal ímynda, at templið í Jerúsalem varð lagt í oyði og jødarnir riknir burtur. Men eisini, at tað koma bæði góðir og minni góðir dagar í hjúnabandinum.

Deyði

Tá ein jødi doyr, samlast tey nærmastu og syrgja. Tey gráta hart og krógva ikki, hvussu hørm og syrgin, tey eru. Siðvenjurnar í sambandi við deyða og jarðarferð skulu hjálpa teimum, ið eftir sita, ígjøgnum sorgina og aftur til gerandisdagin, uttan tann deyða.

Jødisk lóg krevur, at jarðarferðin skal verða skjótast gjørligt eftir andlátið, helst sama dag ella í seinasta lagi tveir dagar aftaná. Jarðarferðin er

einføld, tí jødar halda, at rík og fátøk skulu fáa somu viðferð. Í deyðanum eru øll líka fyri Gudi. Á jødiskum kirkjugørðum líkjast allar gravirnar. Ofta liggja gravsteinarnir niðri. Summir jødar hava tann sið, at steinurin stendur uppi tað fyrsta árið og verður síðani lagdur niður. Onnur ganga ikki so høgt upp í tað. Tá ið skyldfólk vitja grøvina, leggja tey ein lítlan stein eftir seg.

Tann deyði verður vaskaður og vandaliga latin í hvítt klæði. Menn fáa av og á eisini biðisjalið um seg. Tann deyði verður antin lagdur í kistu ella beint í jørðina. Tey nærmastu kasta ofta fyrstu spakarnar av jørð á grøvina. Hetta skal hjálpa teimum at síggja, at deyðin er endaligur.

Eftir jarðarferðina halda tey nærmastu seg við hús í sjey dagar, og farið verður hvørki til arbeiðis ella í skúla. Tey biðja eina serstaka syrgibøn, ið eisini verður endurtikin ársdagin fyri andlátið, tá ið tey eisini tendra eitt ljós at minnast tann deyða. Tað tærir upp á kreftirnar at syrgja, tí skulu tey halda seg heima uttan at hugsa um annað. Skyldfólk og vinir kunnu fylgja við, um okkurt er, ið teimum tørvar, ella verða saman við teimum.

Jødiskur kirkjugarður í Jerúsalem í Ísrael.

Jødiskur kirkjugarður í Krakov í Póllandi.

Útbreiðsla

Nógvir jødar, ið vóru riknir úr Ísrael ella tiknir til fanga av ymsum hersetingarvaldum, komu ongantíð heim aftur. Serliga var tað við Miðjarðarhavið, hesir settu búgv. Teir hildu tó fast við jødisku trúnna og teir siðir, ið vóru knýttir at henni. Teir bygdu eisini sýnagogur, og ofta komu eisini heidningar við til gudstænastur, og tóku teir eisini við jødiskari trúgv.

Soleiðis varð jødadómurin kendur í mongum londum og kom at slóða vegin fyri kristindóminum, serliga í londunum um Miðjarðarhavið.

? viðferð · vandaliga · hersetingarvaldum